# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 28. januar 2020
Mál nr.: 19/00428-5
Málsviðgjørt: JEK
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Dagføring av skattafríu upphæddini til sjálvboðið arbeiði innan ítróttarøkið)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)

(Dagføring av skattafríu upphæddini til sjálvboðið arbeiði innan ítróttarøkið)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 146 frá 13. desember 2019, verður gjørd henda broyting:

Í § 29b, stk. 1 verður "kr. 30.000" broytt til: "kr. 50.000".

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Lógaruppskotið er gjørt, tí tað í samgonguskjalinum er ásett, at skattafría hámarkið til ítrótt skal broytast.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu telist samsýning til dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttina umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttarfeløgum ikki til ta skattskyldugu inntøkuna, um samsýningin ikki fer upp um kr. 30.000 um árið.

Galdandi áseting er frá 1. januar 2013, og ítróttarfeløgini hava tí víst á, at tørvur er á at dagføra upphæddina.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi upphædd, soleiðis tað framhaldandi ber til at fáa skikkað fólk at taka lut í hesum sjálvbodna virksemi.

Landsstýrið ásannar samfelagsliga týdningin av tí stóra sjálvbodna arbeiði, sum verður gjørt innan itróttarøkið. Talan er um dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttin, umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttarfeløgum.

Hesi fólk, sum brúka sína orku og frítíð til at leiða og venja okkara ungdóm, fáa eina ávísa samsýning frá sínum feløgum. Samsýningin samsvarar tó á ongan hátt til ta tíð og orku hesi fólk nýta innan ítróttina.

Samsýningin skal tí lutvíst síggjast sum ein viðurkenning fyri arbeiðið, lutvíst sum eitt endurgjald fyri tær útreiðslur, hesi fólk sjálvi leggja út í arbeiði teirra fyri ítróttin.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður verandi satsur á kr. 30.000 árliga hækkaður upp í kr. 50.000 árliga.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til hoyring hjá ÍSF.

Harumframt hevur uppskotið verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Sambært teimum upplýsingum, Fíggjarálaráðið hevur fingið frá TAKS, blivu kr. 8.170.330 rindaðar 843 persónum fyri sjálvboðið arbeiði innan ítróttarøkið 2018.

Í miðal var upphæddin knapt kr. 9.700.

Av teimum 843 persónunum vóru tað bert 120 persónar, sum fingu eina upphædd á millum kr. 25.000 og kr. 30.000.

Um gingið verður út frá, at tað fyrst og fremst eru hesir 120 persónarnir, sum fáa hækkað sítt útgjald úr kr. 30.000 upp í kr. 50.000, verður økti kostnaðurin til sjálvboðið arbeiði innan ítróttarøkið kr. 2.400.000.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingarnar á umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið ber í sær ein  skattalætta fyri tey, sum hjálpa til innan ítróttina.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleika atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við uppskotinum verður skattafría upphæddin til dómarar, linjuverjar og venjarar innan ítróttina umframt leiðarar og hjálparar hjá ítróttarfeløgum hækkað úr kr. 30.000 um árið upp á kr. 50.000 um árið.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 28. januar 2020

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: